

## Búnaðarstjóri við visjónum

Bjørn Patursson úr Koltri verður nýggjur stjóri á Búnaðarstovuni í Kollafirði, boðar Fiskimálaráðið frá í morgun. Bjørn Patursson er 51 ára gamal og hevur hann drúgvar royndir innan landbúnaðarøkið. Landbúnaðurin hevur altíð havt stóran áhuga fyri nýggja stjóranum á Búnaðarstovuni, sum nú fær møguleika at verða við at menna hesa vinnugreinina. - Eg havi nógvar visjónir um, hvussu landbúnaðurin kann verða mentur í framtíðini, sigur hann við Sosialin. Seinastu árini hevur hann verið formaður í Bóndafelagnum og festari í Koltri. Festara-starv sítt má hann lata frá sær, nú hann fer í nýggja starvið á Búnaðarstovuni í Kollafirði. - Eg gleði meg til uppgávuna, sigur hann. Nýggi stjórin tekur við starvinum á Búnaðarstovuni so skjótt sum ein avloysari er funnin til festið í Koltri.

*Bjørn Patursson hevur so líðandi bygt upp landbúnaðin í Koltri. Nú fær hann møguleika at menna allan tann føroyska landbúnaðin sum stjóri á Búnaðarstovuni í Kollafirði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Taka pulsin á føroyskum bókmentum

**Á stórfingnum bókmentatiltaki komandi dagarnar fara rithøvundar, viðmerkjarar og áhugaði annars at taka pulsin á føroyskum bókmentum sæð í mun til altjóða rák**

BÓKMENTADAGAR 08
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Komandi dagarnir eru halgaðir bókmentunum. Í øllum førum um tú leggur leiðina framvið gamla Reinsarínum, Rit & Rák og Norðurlandahúsinum. Hesi verða nevniliga karmur um Bókmentadagarnar í Havn, sum við maratonupplestri, rithøvundavitjanum og kjaki á ymsar mátar fara at varpa ljós á støðuna hjá føroyskum bókmentum í dag.

### Kroystar bókmentir

Ein av stigtakararnum til Bókadagarnar er Kim Simonsen. Sum rithøvundur og bókmentafrøðingur hevur hann ein neyvan fingur á pulsinum á føroyskum bókmentum, sum hann kundi ynskt sær slóð eitt sindur títtari.

– Vit kunnu í øllum førum staðfesta, at bókmentir hava verið rættliga kroystar av skjótu miðlunum og ymsum léttisoppaundirhaldi seinnu árini. Og tað hevur ikki gjørt tað betri, at høvundar hava svarað aftur vit at grava seg niður í skotgravir, og eru komnir upp aftur við meir og minni óskiljandi verkum, sum sjáldan venda sær til onnur enn seg sjálvan, sigur Kim Simonsen, sum kortini heldur seg hóma glottar.



*- Ætlanin við tiltakinum er millum annað at fáa ein føroyskan vinkul á ymsar aktuellar bókmentaspurningar, sigur Kim Simonsen, sum er ein av stigtakararnum til Bókmentadagarnar*

Hann vísir á, at tað hóast alt framvegis eru høvundar, sum seta uppá at siga universellar søgur um tað at vera menniskja. Millum hesar nevnir hann metsøluhøvundarnar, norska Johan Harstad og danska Carsten Jensen, sum báðir verða við á Bókmentadøgunum. Hinvegin ásannar Kim Simonsen, at tey eru mong, ið halda, at netupp tíðarinnar metsølubókmentir so sum krimisøgur, ævisøgur og siðsøgur eru at meta sum ein hóttan móti fínbókmentunum.

*Men merkir hetta, at eitt nú krimisøgur ikki eru rættar bókmentir, ella hvussu?*

– Tað fari eg ikki at taka dagar ímillum her, men eg haldi at kjakið er áhugavert. Og okkurt bendir á, at tað ikki er so svart/hvítt, sum tað sær ofta sær út. Til dømis nevndi svenski krimihøvundurin, Lisa Marklund, herfyri, at bókmentir í dag eru munandi meir demokratiskar enn fyrr, tá tær bara vóru fyri tey fáu og útvaldu, sigur Kim Simonsen.

### Ov nógvur idyllur?

Men hóast undirhaldsbókmentir hava fingið alsamt fleiri fólk at lesa bøkur, er alt ikki bara idyllur. Ella tað er kanska netupp trupulleikin - at tað hevur verið ov nógvur idyllur á eitt nú føroyska bókmentapallinum seinnu árini

- Vit kunnu í hvussu er undrast yvir, hví vit hava so lítið av samtíðarskaldskapi á føroyskum. Og hví vit síggja so fá yngri episk talent. Eg haldi tað í øllum førum vera tankavekjandi, at meðan ungir føroyskir tónleikarar blóma og gera um seg allastaðni, eru ungir føroyskir rithøvundar meir at kalla ósjónligir, sigur Kim Simonsen.

Hesin eins og ein røð av øðrum spurningum verða serliga á skránni leygardagin, tá lagt verður upp til bókmentakjak í Norðurlandahúsinum.

Men longu í annaðkvøld verður startskotið til Bókmentadagarnar latið av við maratonupplestri á Reinsarínum. Síðani verður hildið á út í eitt líka til sunnudagin, tá serligt ljós eisini verður varpað á barnabókmentir.



*Carsten Jensen*



*Johan Harstad*



*Jóanes Nielsen*



*Gunnar Hoydal*

## FAKTA



### Skrá fyri bókmentadagarnar 4.–7. desember 2008

**Hósdagur 4. desember**
**20.00-23.00** Reinsaríið. Maratonupplestur. Carl Jóhan Jensen, Vónbjørt Vang, Bergur Rønne Moberg, Sigri M. Gaini, Marjun S. Kjelnæs, Oddfríður Marni Rasmussen, Katrin Reinert, Arnbjørn Ó. Dalsgarð, Kim Simonsen og onnur lesa upp

**Fríggjadagur 5. desember**
**17.00** Rit & Rák, SMS. Bókasignering
Bókasignering við rithøvundunum Carsten Jensen (DK) og Johan Harstad (NO)

**Leygardagur 6. desember**
**13.00** Norðurlandahúsið
Allan dagin skipar Rit & Rák fyri framsýning og sølu av bókum, sum komu út í 2007 og 2008. Bøkur eftir útlendsku gestahøvundarnar fáast eisini til keyps
**13.00** Dánjal á Neystabø leggur fyri við einum sangi
**13.05** Helena Dam á Neystabø, mentamálaráðharri, setir dagarnar
**13.15** Arnbjørn Ó. Dalsgarð, formaður í Rithøvundafelagnum, ber fram nøkur orð.
Kim Simonsen, ritstjóri á Outsider Magazin, og Bergur Rønne Moberg legggja upp til dagsins tema
**13.40** Carsten Jensen (Dk) fer at kjakast við Kim Simonsen um støðuna hjá nýggja norðurlendska skaldskapinum
**15.00** STEÐGUR
**15.20** Dánjal á Neystabø og onnur spæla
**15.40** Johan Harstad um støðuna hjá skaldskapinum í samtíðarinnar Norðurlondum, prát við Ivan Niclassen
**16.40** Vit samanfata dagsins tema

**Sunnudagur 7. desember**
**13.00** Norðurlandahúsið
Allan dagin skipar Rit & Rák fyri framsýning og sølu av bókum, sum komu út í 2007 og 2008. Bøkur eftir útlendsku gestahøvundarnar fáast eisini til keyps
**13.00-15.30** Barnabókmentatiltak fyri bæði børn og vaksin. Á skránni verður bæði upplestur, kjak, framsýning og annað undirhald.
Johan Harstad, Rakel Helmsdal, Oddfríður Marni Rasmussen, Marjun Syderbø Kjelnæs, Bergur Rasmussen, Janus á Húsagarði, Bárður Oskarsson og onnur luttaka

Rithøvundafelag Føroya, Norðurlandahúsið, Outsider Magazin, Forlagið Eksil, Vencil, Rit & Rák og tiltakið "Tórshavn - fólkavald kommuna í 100 ár" skipa í felag fyri Bókmentadøgunum í Havn 4.-7. desember 2008.